

sansir.fo

# Fýra nýggj størv í Kaupthing Bank

Virksemi okkara er í støðugum vøkstri. Í hesum sambandi sóknast vit eftir dugnaligum fólki – bæði til Vinnulánsdeild og Umsitingardeild okkara.

Talan er um fýra størv, eitt í Vinnulánsdeildini og trý í Umsitingardeildini.

Vinnukundaráðgevi
Til Vinnulánsdeildina søkja vit eftir einum vinnukundaráðgeva við tilvísing til leiðaran á Vinnulánsdeildini. Tú kemur at fáast við umsiting av lániskjølum og ráðgeving til vinnukundar. Vit vænta, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, ert ágrýtin, hevur viðkomandi útbúgving og orðar teg væl bæði í skrift og talu. Hollur kunnleiki til enskt er ein fyrimunur.

Starvsfólk til umsiting
Til Umsitingardeildini sóknast vit eftir tveimum fólkum, sum koma at fáast við bókhald, roknskap, rapportering, handfaran av skjalagongd í sambandi við virðisbrævahandlar, allar vanligar bankatænastur og aðrar fyrifallandi uppgávur. Størvini eru við tilvísing til leiðaran á Umsitingardeildini.

Tænastufólk
Til Umsitingardeildina sóknast vit eftir einum tænastufólki, sum kemur at fáast við alt fyrifallandi arbeiði og annars ganga til handa. Viðkomandi skal hava koyrikort.

Vit vænta, at tit eru fyrikomandi og eru positiv av lyndi. Vit leggja stóran dent á, at øll okkara starvsfólk eru blíð, opin og løtt at samstarva við. Vit bjóða spennandi størv í einum livandi virki, sum støðugt mennist. Millum starvsfólkini valdar ein góður samstarvsandi í einum góðum og avbjóðandi umhvørvi.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið í Vinnulánsdeildini, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Birgir Christiansen, deildarstjóra, á telefon 351515 / 551515 ella telduposti birgirc@kaupthing.fo.

Viðvíkjandi størvunum í Umsitingardeildini skulu spurningar stílast til Regin I. Jakobsen, deildarstjóra, á telefon 351510 / 551510 ella teldupost regin@kaupthing.fo.

Umsóknir skulu í seinasta lagi 16. februar 2007 vera okkum í hendi:

Kaupthing Bank
Bókbindaragøta 8
Postboks 3090
FO-110 Tórshavn

Kaupthing Bank virkar í dag í tíggju ymiskum londum og umsitur virði fyri meira enn 100 mia. kr., bæði fyri stovnar og privatar íleggjarar. Les meira á www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK